gult20 cyan20 magenta20 svart20



**URIASTARV. Kontanti hvalbingurin stendur á brúnni hjá Strandafaraskipum Landsins, og hóast stovnurin er eitt yndisoffur hjá misnøgdum fólki, trívist Reidar Nónfjall væl í útsetta starvinum**



*- Eg kann vera kontantur sum stjóri, men tað er umráðandi, at tað ikki bara er peikifingurin, sum er á lofti. Starvsfólkini skulu eisini hava rós, tá tey hava gjørt eitt gott arbeiði, og eg kundi ikki funnið uppá at slept teimum uppá fjall, sigur Reidar Nónfjall.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Millum brot og vandasker

*Eyðun Klakstein*

Hann hevur skrivstovu á ovastu hædd í skrivstovubygninginum Yvir við Strond í Havn. Av skrivstovuni sær hann út á hav, og gjøgnum dagin kann hann halda eygað við nøkrum av ferjunum, sum hann er stjóri fyri.

Hann er vælklæddur í jakkasetti, hvítari skjúrtu og slipsi, og skrivstovan hjá stjóranum er ruddilig og snotulig.

Hvalbingurin Reidar Nónfjall stendur á brúnni hjá Strandfaraskipum Landsins, og undir sær hevur hann 240 starvsfólk, 12 ferjur, 10 bussar og 15 lastbilar.

Strandferðslan er ein stovnur, sum fólk ikki spara í dagliga prátinum um seinkaðar ferjur, manglandi pláss, stappaðar bussar og avlýstar túrar.

Og sum stjóri fyri Strandferðsluni er Reidar Nónfjall meiri enn nakar annar maðurin, sum fólk hugsa um, tá um Strandferðsluna ræður.

– Tað kann við hvørt verða eitt ótakknemligt starv at verða stjóri á Strandferðsluni. Serliga tá politikarar leypa á uttan at hava neyðugar upplýsingar um, hvat vit í veruleikanum gera í fyritøkuni. Talan er ofta um at leypa upp um, har garðurin er lægstur og sleingja nakað út uttan hald í veruleikanum, og á tann hátt misbrúka Strandferðsluna fyri at fáa politiskan løtuvinning.

– Eg haldi, at politikarar og fólk annars skulu vísa seg sum rættar menn og kvinnur og siga sína hugsan á grundaðan og sakligan hátt – ikki niðurgerandi. Hinvegin fegnist eg eisini um, at vit seinastu árini hava fingið rós frá politisku myndugleikunum og frá onkrum borgarum eisini, sigur Reidar Nónfjall.

– So leingi eg kann gera upp, at eg saman við starvsfólkunum havi eina positiva ávirkan á virksemið hjá stovninum, so meti eg ikki starvið sum óhugaligt ella ótakknemligt í síni heild.

## Uttan avgerðir endar galið

Reidar Nónfjall ætlaði at samrøðan skuldi gerast í svørtu leðurmøblunum í horninum á rúmligu skrivstovuni. Hann hevur sett kaffikannu og hvítar koppar á glasborði, men myndamaðurin ger vrøvl, tí hann vil taka myndir, meðan Strandferðslustjórin situr við skriviborðið hjá sær.

– Stjórastarvið her kann verða strævið og krevjandi, og familjan merkir tað ivaleyst av tí nógva samskiftinum, sum er døgnið runt, og at eg arbeiði um næturnar heima. Tað kemur meiri enn so fyri, at eg fari upp á miðjari nátt at gera eitthvørt, sum krevur frið og tíð at fáa frá hondini, greiðir Reidar Nónfjall frá.

Hann tosar við javnari ferð; álvarsamur og kontantur. Hann veipar eitt sindur, men er allatíðina greiðir yvir, hvagar hann vil.

– Starvið hjá mær er antin svart ella hvítt – antin klárar tú tað ella klárar tú tað ikki. Um tú velir ein millumveg í eitt ella tvey ár og ikki avgreiðir mál so hvørt, so endar galið á øllum frontum.

– Hinvegin dámar mær væl at arbeiða undir trýsti, og eg hugsi kanska meiri klárt og konstruktivt, tá stórt trýst er á mær. Hetta haldi eg kemur mær til góðar, tá tað stendur á og brýtur í bæði borð.

Strandferðslan er almennur stovnur, og tí eru tað á ein hátt borgararnir í landinum, sum eiga stovnin, men hvørja ávirkan skulu teir hava á virksemið. Og so eru tað løgtingsmenn, landstýrismaður og fakfeløg.

– Fyri at yvirliva í einum slíkum meldri av áhugabólkum er alneyðugt at leggja nakrar karmar og signalisera hesar úteftir. Tað er eisini neyðugt at eftirmeta, um leiðslan er á rættari leið, og tí er tað eisini stuttligt at hoyra, tá fólk siga, at Strandferðslan hevur eina meining um tingini og hevur lagt nakrar linjur.

– Hevur Strandferðslan onga almenna meining, sum fólk kunnu fyrihalda seg til, so er tað beinleiðis vandamikið fyri menningina av stovninum. Meðan tað ganga ár ímillum at fólk hoyra um ávísar almennar stovnar, so er Strandferðslan allatíðina frammi, og tað gevur eisini góðar møguleikar fyri at gera leypandi betringar, sigur Reidar Nónfjall.

## Opinleiki týðandi

Strandferðslustjórin leggur dent á, at hansara stovnur skal verða opin og fyrikomandi.

– Eg royni í størsta mun at geva mær tíð til at tosa við fólk og halda tær avtalur, sum verða gjørdar. Vanliga eru fólk eitt sindur uppfarandi, tá tey byrja eitt prát, men tá eg greiði frá, eg eri áhugaður í at hoyra um teirra misnøgd og gera nakað fyri at loysa trupulleikan, so kemur ofta nakað gott burturúr.

– Eg royni altíð at venda við samrøður misnøgd fólk til nakað konstruktivt, tí á tann hátt kann Strandferðslan fáa nakað burtur úr slíkum samrøðum.

Reidar Nónfjall leggur dent á opinleikan, og hann heldur seg hava góðar royndir av hesum.

– Vanliga kunnu starvsfólkini á Strandferðsluni avgreiða viðskiftafólkini, sum hava okkurt at finnast at, men við hvørt eru fólk so uppøst, at tey vilja bara tosa við stjóran. Hetta kemur tó sera sjáldan fyri.

gult21 cyan21 magenta21 svart21



*– Stjórastarvið her kann verða strævið og krevjandi, og familjan merkir tað ivaleyst av tí nógva samskiftinum, sum er døgnið runt, og at eg arbeiði um næturnar heima. Tað kemur meiri enn so fyri, at eg fari upp á miðjari nátt at gera eitthvørt, sum krevur frið og tíð at fáa frá hondini, greiðir Reidar Nónfjall frá.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



Eitt er uppgávan sum stjóri á Strandferðsluni og tær áhugaverdu og minni áhugaverdu uppgávur, sum hetta hevur við sær. Nakað annað er lívið sum privatpersónur við síðuna av útsetta starvinum.

– Tað er sjálvandi ilt at siga, nær eg eri stjóri, og nær eg eri privatpersónur. Í Føroyum eru viðurskiftini smá, og tí ber tað illa til at vera anonymur. Eg havi eina familju at vera saman við – konu og fýra børn – og tey royni eg at raðfesta frammaliga sum privatpersónur, sigur Reidar Nónfjall.

– Eg royni eisini at vitja kenningar og vinir, og hóast tað meiri enn so kemur fyri, at fólk hava onkra viðmerking til viðurskifti á Strandferðsluni, so duga tey at koma við teimum, uttan at vit fara í holt við nakað drúgt kjak um tað. Men sum heild haldi eg, at eg fái góðan frið sum privatpersónur.

## Starvsfólk ikki sleppast uppá fjall

Myndamaðurin hevur fingið eitt hugskot og leggur upp í samrøðuna. Hann klikkir, og tað blitsar. Prátið verður sett í gongd aftur, og slíkt órógv fær ikki Strandferðslustjóran at missa tráðin. Hann hevur nógv uppá hjartað, hann hevur meiningar um sítt starv og sín stovn, og hann er greiður og avgjørdur, tá hann tosar.

- Fyri nøkrum árum síðani vóru flestu almennir stjórar og deildarleiðarar politiskt settir og ikki fakliga. Hetta er nú broytt og er eitt stórt framstig í Føroyum. Fyri meg hevði hetta sera nógv at siga, tá eg søkti stjórastarvið á Strandferðsluni.

Men hóast fakligi førleikin er settur í hásætið, so slepst ikk undan politiskum viðurskiftum, tá talan er um Strandferðsluna.

- Strandferðslan verður politiskt kontrollerað, og stovnurin er fíggjarlógarstýrdur. Hetta setir nakrar avmarkingar, og fólk hildu eisini, at eg søkti ein starv, sum er trupult at røkja. Men eg haldi, at royndir innan almenna umsiting og øðrum leiðsluarbeiði í privatu vinnuni hava verið ein stórur fyrimunur at havt í viðførinum, sigur Reidar Nónfjall.

- Tað ræður um at seta seg væl inn í rættindi og skyldur sum stjóri og ábyrgdarhavandi, tú skalt halda teg burtur frá politiskum kjaki um eitt mál, og tú skal lata verða við at vísa politiskan lit. Tað ræður um í størsta møguligan mun at arbeiða reint fakliga.

Reidar Nónfjall tekur leiðarauppgávuna á Strandferðsluni í sera stórum álvara, og hann hevur greiða hugsan um, hvat hansara leiklutur skal verða. Hann skal millum annað verða framsíggin, hava yvirlit yvir fyritøkuni, fyriskipa og útdelegera, og hann skal savna og útnytta vitanina í fyritøkuni.

- Ein stjóri skal eisini virka sum góður lærumeistari, og hann skal hava dirvi at taka avgerðir. Ein leiðsla skal veruliga vísa sína styrki, tá stórir trupulleikar taka seg upp, og hon skal koma við skjótum og góðum loysnum.

- Eg kann vera kontantur sum stjóri, men tað er umráðandi, at tað ikki bara er peikifingurin, sum er á lofti. Starvsfólkini skulu eisini hava rós, tá tey hava gjørt eitt gott arbeiði, og eg kundi ikki funnið uppá at slept teimum uppá fjall, sigur Reidar Nónfjall.

Seinni avtalaði tímin gongur móti endanum, og Strandferðslustjórin gerst varugur við, at kaffi stendur ónortið á glasborðinum.

- Nú gloymdi eg kaffi, sigur hann og fer eftir kannuni og koppum.

Meðan hann skeinkir uppí kopparnar, skoytir hann út gjøgnum vindeygað. Einki strandfaraskip er at hóma, men á skriviborðinum við vindeygað liggja uppgávur og bíða eftir viðgerð. Ikki einum mjúkum millumvegi, men eftir ítøkiligari avgerð.




*– So leingi eg kann gera upp, at eg saman við starvsfólkunum havi eina positiva ávirkan á virksemið hjá stovninum, so meti eg ikki starvið sum óhugaligt ella ótakknemligt í síni heild, sigur Reidar Nónfjall.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Frá tónleiki til búskap

**Strandferðslustjórin royndi seg sum tónleikara í nógv ár, áðrenn hann fór til Danmarkar at taka útbúgving og endaði sum almennur stjóri**

*Eyðun Klakstein*

Eg sjólívið valdi, sang suðuroyarbólkurin, Sputnik, miðskeiðis í áttatiárunum, og ein av tónleikarunum í hesum bólkinum var núverandi Strandferðslustjórin.

Reidar Nónfjall spældi í sínum ungum døgum nógv tónleik til dans, brúdleyp og veitslur, men tað var ikki sum tónleikari, at hann skuldi gerast landskendur.

- Eg minnist, at eg sum 11 ára gamal gjørdi tekningar av Smyrli. Eg hevði helst ikki hugsað mær, at eg skuldi gerast reiðari, men heldur høvdu eg og vinmaðurin hug at standa á brúnni og stýra, sigur Reidar Nónfjall.

Sum smádrongur plagi Reidar at egna, og honum dámdi eisini væl at verið við í seyðahaldinum. Hann arbeiddi seinni í kolanáminum í Hvalba, og meðan hann læs, arbeiddi hann á flakavirkinum í Hvalba.

## Fekk eitt sjokk

Í 1981 tók Reidar Nónfjall HF-prógv á Tvøroyri, og í 1984 fór hann undir at lesa til civiløkonom.

- Tað var eitt kultursjokk at koma úr Hvalba til Danmarkar. Eg gloymi ongantíð, tá eg stóð einsamallur á Ørnevej í Keypmannahavn við einum kufferti og skuldi flyta inn í eitt kamar upp á 12 fermetrar at búgva næstu fimm árini, greiðir Reidar Nónfjall frá.

Í 1987 var hann liðugur sum civiløkonomur og helt fram at lesa til cand. merc. næstu árini. Hendan lesnað gjørdist hann liðugur við í 1991, tá hann fór í starv á fíggjar- og búskapardeildini í Tinganesi.

Men tað var, tá hann tók við sum stjóri á Strandferðsluni, at hann rættiliga kom í andglettin. Seinastu árini hevur hann havt týðandi leiklut í føroysku samferðsluni, og hann trívist væl í hesum leikluti.